HOYR

Umhvørvis- og vinnumálaráði

Tórshavn 09.07.2020

Viðvíkjandi Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur og í løgtingslóg um val til Løgtingið.

(Valrætt til persónar, sum hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6)

Hoyr hevur hesar viðmerkingar til uppskotið:

1. Í § 1 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
   "Stk. 3. Hóast stk. 1, litra a, hevur persónur, sum er undir verjumáli og hevur fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6, valrætt og valbæri til kommunuval.". Stk. 3–4 verða eftir hetta stk. 4–5.

   Hoyr fegnast um hesa broyting, og er tað ein sjálvsagdur rættur hjá øllum, at hava valrætt.

2. § 15 verður orðað soleiðis:
   "Um veljari møtir til val og sigur seg ikki føran fyri einsamallan at greiða atkvøðu á ásettan hátt, kann hann fáa hjálp til hetta frá tveimum av nevndarlimunum ella hjálparfólkunum.
   Stk. 2. Um veljari ikki er førur fyri at koma sær inn í valhølið, kann hann krevja, at atkvøðugreiðslan fer fram beint uttan fyri valhølið, og skulu í hesum føri tveir av nevndarlimunum ella hjálparfólkunum vera hjástaddir, og um neyðugt veita honum hjálp við atkvøðugreiðsluni.
   Stk. 3. Veljarin kann krevja at annar av persónunum, sum veitir hjálp við atkvøðugreiðsluni, sbrt. stk. 1 ella 2, verður skiftur út við ein persón, sum veljarin sjálvur vísir á.
   Stk. 4. Nevndarlimir, hjálparfólk og persónar, sum veljarin sjálvur vísir á, hava tagnarskyldu, tá ið teir veita hjálp sbrt. stk. 1-3.".

   Hoyr heldur, at tað er gott, at lógin verður broytt, tó vil felagið vísa á, at valið eigur at verða í hølum, ið eru atkomulig hjá øllum.

   Felagið vil vísa á, at tað hevði bøtt munandi um møguleikan, at atkvøtt sjálvstøðugt, um atkvøðuseðlarnir høvdu mynd av valevnunum, og um møguleiki er fyri, at nýta teldutøkar atkvøðuseðlar. Hetta vildi verið við til, at gjørt tað møguligt hjá flestu føroyingum, at atkvøtt sjálvstøðugt, og vilja vit heita á løgtingslimir um at tryggja øllum borgarum í Føroyum, sama rætt at atkvøða sjálvstøðugt.

Vinarliga

Nevndin

